

*Tað besta kom fyrst, tá Hallur Joensen legði fyri við bluegrass av evstu skuffu saman við undurbæru røddini hjá kórsangaranum, Kristinu Bærentsen*

# Í øvutari raðfylgju

**Tað besta varð skotið av beinanvegin, tá Hallur Joensen og Kristina Bærentsen løgdu fyri við bluegrass á kontrikonsertini hjá Faroe Sound leygarkvøldið**

UMMÆLI
*Birgir Kruse*
*Myndur: Álvur Haraldsen*



*Mest sjáldsami parturin av pallsetingini var frálíki ungi Daniel Nielsen, sum undir hatti streyk eini hillbillyfiól alla konsertina á tamp*

Kontrikonsert var í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Konsertin var í trimum, fyrst Hallur Joensen, síðani Rannvá Vesturklett og at enda Ragnar í Vík.

Øll trý høvdu nógv og gott fylgispæl, kórsangarar eisini. Mest sjáldsama var ungi Daniel Nielsen, sum undir hatti streyk eini hillbillyfiól alla konsertina á tamp. Ein frálík pallseting. Hinumegin í ljóðmyndini var Jóhan Petur Hansen á mandolin og aftastur í ljóðmyndini Pauli Magnussen á kontrabass. Fremst fyri í fyrsta parti, saman við Halli, var hin undurbara kórrøddin hjá Kristinu Bærentsen.

Hetta var byrjunaruppstillingin. Framhaldandi kundi hetta verið karmurin um eina perfekta kontrikonsert, eitt *hoedown* við nýslignum grasi, sum í Grand Ole Opry í Nashville. Men eftir nakrar heilt fáar sangir smildraðu trummurnar ljóðmyndina.

Kontrabassurin hjá Paula hevði kunna borið allan ljóðbotnin í hesum setti. Fyrstu sangirnir, uttan trummu, vóru bluegrass av evstu skuffu. Hallur sang fyri, í góðari kontakt við fyrst og fremst tónleikararnar á pallinum og síðani fólkið í høllini.

Hann hvíldi so sjáldsama væl í sær sjálvum, at tá nakrir ungir fýrar, ið komu alt ov seint til konsertina, váladu framvið mikrofonini og heilsaðu uppá hann, fingu teir eina vinaliga heilsan aftur, uttan at Hallur misti stev ella tóna. Tað havi eg ikki sæð áður. Og so slettis ikki í Norðurlandahúsinum. Sovorið ger man bara ikki. At møta ov seint og vera so næsadjarvt líkasælur at heilsa uppá sangaran.

Hetta sama myndaði huglagið í Høllini í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið. Eingin fínarumpa, bara vanlig fólk, sum hugnaðu sær. Tilkomnir menn við hesthala og spískum svartaskóm, vælsmurdar konur í barmfagurt glitrandi blusum og uppsettum hári. Sjómenn og verkafólk. Og so feinsmekkararnir. Ein heil røð av feinsmekkarum, ið høvdu funnið saman at skifta orð um Hank Williams, kontritónleik og fólksligu sálina á bygd.

Í øðrum parti sang Rannvá Eysturklett. Tónleikararnir vóru skiftir út og vóru nú mest